VÍF-StÍF 26-17 (14-9):

# VÍF spílar seg út

**Eftir eina veika byrjan tykjast VÍF-kvinnurnar at vera komnar fyri seg. Mikukvøldið fekk StÍF ikki fótin fyri seg í Vestmanna, tá VÍF stríddist fyri sigrinum**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*

Síðstu tvey árini hava kvinnurnar hjá VÍF vunnið greipuna, og eingin hevur veruliga fingið gjørt nakað við tær. Men í ár hevur verið øðrvísi, og VÍF hevur longu tapt heilar tríggjar dystir.

Kortini hava VÍF-kvinnurnar ikki givið skarvin yvir, og tað fekk StÍF at kenna í Vestmanna mikukvøldið, tá dystur var um, hvør skuldi sleppa at taka kappingina upp við VB á oddasessinum.

Og hóast byrjanin í vetur ikki hevur verið nakað serlig, vísti undirtøkan í høllini, at vestmenningar ikki hava gloymt tær, tí tað fólkið, sum var og hugdi mikukvøldið, var stórt sæð komið til kvinnudystin. Bara nøkur tandur løgdust aftrat, tá mansdysturin var aftaná.

Í eitt korter megnaði StÍF at fylgja við, men so menti VÍF seg og slapp sær av 6-6 upp á 10-6. Og so sá StÍF ongantíð ordiliga aftur í halaferðina á vestmannakvinnum.

Bert ta einu løtuna í seinna hálvleiki var tað um reppið, at StÍF fekk svarað aftur, men tá megnaði Manuela Stam í VÍF-málinum mestsum einsamøll at forkoma møguleikunum hjá StÍF at sleppa upp í part av nýggjum.

### Manuela helt tætt

Hesa avgerandi løtuna tók hon trý brotskøst, meðan meira enn illa lá fyri hjá útispælarunum at løna henni fyri stríðið við at skjóta nøkur mál í hinum endanum.

StÍF stóð væl, og tá VÍF royndi at gera eitt sindur um seg, vóru feilir og ov nógvur skundur ofta orsøk til, at einki kom burturúr.

Leiðslan hjá VÍF minkaði úr átta niður í fýra mál, men so var tann hvøkkurin eisini av, og VÍF gjørdi enn ein vørr og vann trygt við níggju málum, 26-17.



*Kvinnurnar hjá VÍF tykjast veruliga hava fingið ferð á. Mikukvøldið vitjaði StÍF, og her fingu Nicoleta og tær veruliga hevnd fyri tapið á Skála fyrr í heyst*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Burtur sæð frá hesi einu løtuni í seinna hálvleiki, var tað eitt rættiligt liðavrik, ið lá aftan fyri sigurin hjá VÍF, tí allar stríddust fyri sakini, eins og tær um vikuskiftið eisini gjørdu tað í dystinum móti Neistanum.

At breiddin er har, varð staðfest, tá VÍF síðstu løtuna gjørdi nakrar útskiftingar, ið avgjørt ikki gjørdu liðið veikari.

Nú líkt er til, at ikki skal roknast við Ioanu Rapa meira í vetur, kemur tað væl við hjá vestmenningum at síggja, at VÍF-kvinnurnar eisini kunnu stríðast, um tað krevst.

Síðstu tvey árini hevur tað í summum dystum kanska verið í so lætt, og mótstøðan hevur kanska ikki altíð verið størsta avbjóðingini.

Men nú nógvir av dystunum krevja meira av spælarunum, verður eisini víst í verki, at liðið dugir at fáa arbeiðssigrar til høldar, tá tað er neyðugt.

Við sigrinum er VÍF nú bara tvey stig aftan fyri oddaliðið VB, ið enn einki stig hevur sett til, men tann munurin kann økjast so skjótt, tí VB hevur spælt tveir dystir færri enn VÍF.

### Dysturin í tølum:

**VÍF-StÍF 26-17 (14-9)**
Málskjúttar:
VÍF: Sóley Mikkelsen 9 (2), Jacklyn Durhuus 7 (3), Nicoleta Radu 5, Fríða Marjunardóttir 3 (1), Nikolina Eyðbjørnsdóttir 1, Hertha Simonsen 1
StÍF: Asta Petraukieke 7 (3), Alina Olaru 5 (1), Anna Maria Berthelsen 2, Anna B. Danielsen 1, Paula B. Høgnesen 1 (1), Poula D. Olsen 1
Brotskøst: VÍF 6, StÍF 9
Útvísingar: VÍF 4, StÍF 2
Dómarar: Hannis Wardum og Eyðun Samuelsen

H71-Neistin 30-33 (14-14):

# Síðsta løtan avgjørdi alt

**Tá Neistin síðsta korterið valdi at mansverja Halgir Dahl Olesen, fann H71 ikki fleiri streingir at spæla uppá, og tí kundi Neistin halda fast um leiðsluna og sigurin**

MANSHONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*

Ikki fyrr enn einir tíggju minuttir vóru eftir, bleiv dysturin í Hoyvíkshøllini millum H71 og Neistan avgjørdur, og tað var Neistin, sum fór avstað við øllum.

Vápnið var einfalt, tí eitt korter fyri tíð valdi Neistin at mansverja størstu skothóttanina hjá H71, Halgir Dahl Olesen, og tað tók fullkomuliga broddin av spælinum hjá hoyvíkingum, ið ikki megnaðu at svara aftur.

Tað hevði annars verið javnt fram til hesa avgerandi løtuna. Eftir ein fyrra hálvleik, har hvørki liðið nakrantíð slapp frá hinum, stóð á jøvnum 14-14.

Onkra løtu í fyrra hálvleiki valdi Neistin at taka Halgir burturúr, tá hoyvíkingar vóru í minniluta á vøllinum, men uttan at tað tóktist ávirka spælið hjá H71 nóg nógv til, at Neistin endurtók hetta — fyrr enn altso móti endanum.

Í seinna hálvleiki líktist tað fyrsta korterið spælinum, sum hevði verið fyrsta hálva tíman, og mong mundu helst væntað, at kanska tveir ella tríggir teir síðstu minuttirnir kundu gerast dramatiskt avgerandi fyri, hvør vann.

### Vantandi hugflog

H71 var kanska heldur betur fyri og var ofta liðið, ið legði seg framum. Men tá støðan var 22-21 til hoyvíkingar, settu Neistamenn mansverjuna inn, og hon gav beinanvegin úrslit.

Frá at hava verið aftanfyri, kom Neistin í einum taki framum við tveimum málum, og seinni øktist munurin upp í fýra mál.

Hoyvíkingar megnaðu ikki tað sama, tá teir noyddust at spæla, uttan at fáa stórskjúttan uppí, og tí fekk Neistin frið og náðir at halda fast um leiðsluna og kundi tryggja sær sigurin hesa síðstu løtuna.

Tað vísti seg eisini móti endanum, at spælararnir hjá Neistanum orkaðu eitt sindur meira og gjørdu heldur ikki so nógvar feilir sum teir hjá H71, ið hesa ferð vóru nær við, men samstundis avdúkaðu, at teir mugu leita eftir hugflogi at brúka, næstu ferð mansverja pilkar spælið sundur.

Við sigrinum er Neistin nú á triðja plássi, við sama stigatali sum VÍF, men tó tvey stig aftan fyri StÍF.

### Dysturin í tølum:

**H71-Neistin 30-33 (14-14)**
Málskjúttar:
H71: Jákup á Borg 10 (1), Halgir Dahl Olesen 6, Niels V. Niclasen 4, Esbern Patursson 3, Tróndur Vatnhamar 3 (3), Bárður Brimvík 2, Hans J. Jacobsen 2
Neistin: Áki Mørk 6, Morgan Knezevic 6 (3), Ragnar Stakksund 5, Helgi K. Justinussen 4, Birgir F. Kass 4, Kári Mortensen 3, Dann Thorleifsson 3, Rani Slættanes 2
Brotskøst: H71 5, Neistin 4
Útvísingar: H71 3, Neistin 2
Dómarar: Kári Hansen og Trygvi Mortensen

Tjaldur-Kyndil 26-22 (11-11):

# Tjaldursmenn koppaðu Kyndli

**Eftir sjey tap á rað hevur Tjaldur vent byttuni. Fyrst við at basa StÍF sunnudagin og síðani mikukvøldið við eisini at vinna á Kyndli**

MANSHONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*

Tjaldur megnaði mikukvøldið at halda fast í góða endanum frá dystinum móti StÍF, og tað gav hesa ferð sigur á Kyndli.

Kyndil kanska ikki hevði væntað sær ta mótstøðuna, Tjaldur hevði at geva, og var tað kanska ein orsøk til, at Tjaldur vann sær tvey týdningarmikil stig aftrat.

Men tað var ikki øll orsøkin. Tjaldur spældi væl, og serliga í verjuni vóru menn stinnir at blokka skotroyndir frá Kyndli.

Og so skal málverjin Dejan Lacod ikki gloymast, tí umframt at taka fimm av teimum sjey brotskøstunum hjá Kyndli, skoraði hann eisini eitt mál sjálvur, tá hann úr egnum máli sendi bóltin alla longdina á vøllinum.

Júst hetta málið var eisini rættiliga avgerandi fyri gongdina í dystinum, tí eftir at Tjaldur hevði havt góða byrjan við einari 4-1 leiðslu, steðgaði alt upp, og Kyndil slapp sær upp á 10-5.

Tá var tað, at Dejan tók sakina í egnar hendur og setti skjøtil á málskjótingina hjá Tjaldri av nýggjum. Og tað gav bonus, tí hálvleiksstøðan var 11-11.

Ikki minst kom tað væl við hjá Tjaldri hesa løtuna, at Jens Martin Knudsen aftur er á liðnum, tí hann órógvar mótstøðuliðið og er uppi í nógvum, uttan endiliga at skula skjóta øll málini sjálvur.

### Mansverja broytti einki

Tann stóri munurin, sum hevði verið í fyrra hálvleiki — fyrst til fyrimuns fyri Tjaldur og síðani Kyndli — var ikki at síggja eftir hálvleikssteðgin, tá tað gekk meira javnt á.

Kortini var tað Tjaldur, ið gekk undan, og síðstu gott og væl 25 minuttirnar fekk kom Kyndil ongantíð aftur upp á javnleik.

Á liðnum hjá Kyndli stóð Johan Danielsen væl í málinum, og hóast hann einki fekk gjørt við fleiri av Tjaldurs-skotunum, ið komu beint gjøgnum verjuna, tók hann nógv annað.

Hinvegin var kanska ov lítil broddur í tí, sum Jacob Jónsson og Finnur Hansson royndu at fáa burturúr. Spælið teirra millum gekk kanska skjótt og væl, men heildini gav tað ikki so nógv.

Í seinna hálvleiki royndi Kyndil at pilka spælið hjá Tjaldur sundur við at mansverja málslúkin Dragisa Stojovic, men tað broytti einki, tí hinir hjá Tjaldri megnaðu kortini at varðveita yvirtakið og at spæla seg til neyðugu møguleikarnar.

### Dupult útvísing

Tá so Jens Martin fýra minuttir fyri tíð fyrst fekk eina útvísing og so eina aftrat, tí hann ikki vildi góðtaka ta fyrstu, tóktist tað heldur ikki ávirka spælið hjá Tjaldri, at liðið hesar síðstu minuttirnar mátti spæla við einum manni í minniluta.

Eisini hesa løtuna vísti Dejan í málinum gott spæl og tók eitt nú enn eitt brotskast, so munurin kundi halda sær, til liðugt var.

Tískil gjørdist tað til ein fult uppibornan sigur til Tjaldur í dystinum, sum ikki bara stríddist fyri lívinum, men eisini vísti gott spæl. Tað sama gjørdi Kyndil, men kortini virkaði tað, sum hekk ein skuggi av undirmeting alla tíðina yvir spælinum, og tí kundi tað at enda ikki spyrjast annað enn tap burturúr móti vælupplagda heimaliðnum.

Hóast kærkomna sigurin er Tjaldur framvegis aftast, men hevur nú sama stigatal sum H71 og er bara eitt stig aftan fyri KÍF. Kyndil liggur framvegis í miðjuni, uttan at vera í vanda fyri aftaru liðunum og uttan at røkka tey ovaru.

### Dysturin í tølum

**Tjaldur-Kyndil 26-22 (11-11)**
Málskjúttar:
Tjaldur: Dragisa Stojovic 7, Zoran Sarpevic 6 (2), Sverri Justinussen 5, Jens Martin Knudsen 4, Áki L. Hansen 1, Dejan Lacod 1, Arnfinn Langgaard 1, Tórhallur Thomsen 1
Kyndil: Høgni Klein 7, Finnur Hansson 6, Regin Johannesen 4, Josef Abrahamsen 2, Jacob Jónsson 2, Hanus Jensen 1, Jónleif Sólsker 1
Brotskøst: Tjaldur 2, Kyndil 7
Útvísingar: Tjaldur 3, Kyndil 2
Dómarar: Kristian Johansen og Sámal Hansen



## UTTAN ÚR HEIMI

# »Prestige« kundi tað sama sokkið í donskum sjógvi

**Tangaskipið var í so vánaligum standi, at tað kundi eins væl verið sokkið í donskum sjógvi. "Prestige" fór ígjøgnum Stórabelti tann 6. november**

UMHVØRVISDÁLKING
*Árni Joensen*

Donsku loðsarnir ávara nú um, at tað er bara ein spurningur um tíð, til danskt sjóøki og donsku strendurnar verða raktar av einari umhvørvisvanlukku.

Tangaskipið "Prestige", sum fór av um tvøran og sakk úti fyri sponsku útnyrðingsstrondini, fór ígjøgnum Stórabelti tann 6. november, og tað var í so vánaligum standi, at tað kundi eins væl verið sokkið har.

Tað sigur Jens Jørgen Thuesen, sum var loðsur umborð á skipinum, tá tað fór ígjøgnum Stórabelti.

Í Sjóferðslustýrinum undrast stjórin, Jørgen Hammer Hansen, á, at loðsurin ikki boðaði myndugleikunum frá, hvussu vánaligum standi skipið var í, tí tað eigur loðsurin at gera í einum slíkum føri, sigur stjórin.

Men so einfalt er málið ikki, sigur formaðurin hjá teimum donsku loðsunum, Mogens von Jessen. Hann sigur, at høvdu donsku loðsarnir meldað skip, sum teir hildu vera í vánaligum standi, hevði tað bert havt við sær, at tey vánaligu skipini høvdu als ikki biðið um at fáa loðs umborð. Sjálvur heldur hann, at tað er bara ein spurningur um tíð, til ein álvarssom umhvørvisvanlukka hendir í donskum sjógvi.

Á hvørjum ári fara 22.000 skip ígjøgnum Stórabelti, og soleiðis sum reglurnar eru, er tað skiparin, sum í hvørjum einstøkum føri ger av, um hann vil hava loðs umborð. Donsku politikararnir hava fleiri ferðir umrøtt spurningin um at áleggja øllum skipum at taka loðs umborð, men enn er einki hent í málinum. Seinast, málið var frammi, var, tá farmaskipið "Baltic Carrier" sigldi á eina grynnu við Møn á vári í 2001.

# Hesaferð doyðu 12

**Í fýra mánaðir var eingin sjálvmorðsbumba brostin í Jerusalem, men gjáramorgunin var friðurin úti**

ÍSRAEL
*Árni Joensen*

Tólv fólk doyðu, tá ein palestinskur sjálvmorðsbumbumaður sprongdi seg í luftina í Jerusalem tíðliga gjáramorgunin.

Maðurin var í einum bussi, sum var fullur av fólki. Busurin var á veg úr býarpartinum Kiryat Menaham har vesturi í Jerusalem og skuldi inn í miðbýin við arbeiðsfólki og børnum, sum skuldu í skúla.

Men tey komu ongantíð so langt. Á vegnum sprongdi maðurin bumbuna, sum hann hevði hjá sær. Tólv fólk doyðu, og meiri enn 40 vórðu særd.



*Vanlig sjón í Miðeystri: Líkposar á gongubreytini*
*Mynd: Reuters*

Nær maðurin kom upp í bussin, dugdi løgreglan ikki at siga í gjár, og hon visti heldur ikki, hvør bumbumaðurin var.

Ein talsmaður hjá ísraelska innanríkisráðnum segði, at tað var uttan iva ein palestini, sum hevði sprongt bumbuna. Talsmaðurin segði, at tilburðurin er enn eitt dømi um palestinska ágangin ímóti ísraelska sivilfólkinum, og hann legði afturat, at hetta kann ikki halda fram.

Beint aftan á spreingingina fóru fleiri ísraelsk hernaðarakfør inn í Betlehem, men einki varð sagt um, hvør ætlanin við átaklinum var. Ísraelski herurin hevur ikki verið í Betlehem síðani tann 19. august, tá herurin tók seg aftur eftir einari avtalu millum ísraelskar og palestinskar myndugleikar. Eftir teirri avtaluni skuldi ísraelski herurin fara úr býnum, aftur fyri at palestinar skuldu gevast við at søkja at málum í Ísrael. Men sum so mangar aðrar avtalur millum teir báðar partarnar helt hendan heldur ikki.

# Sjey lond afturat í NATO

NATO-londini samdust á fundi í Prag í gjár um at geva sjey eysturevropeiskum londum limaskap í verjusamgonguni.

Tey sjey nýggju limalondini eru Estland, Letland, Litava, Slovakia, Slovenia, Bulgaria og Rumenia, men formliga verða tey ikki limir í samgonguni fyrr enn í 2004. Fyri trimum árum síðani komu Kekkia, Ungarn og Póland upp í NATO.

NATO-aðalskrivarin, George Robertson, sigur, at tey nýggju limalondini fara at gera NATO sterkari og fara at gera framtíðina hjá verjusamgonguni tryggari.

## Rættarmál um flogvanlukku

Rættarmálið í sambandi við flogvanlukkuna í Linate-floghavnini í Milano, sum kravdi 118 mannalív, byrjaði fyrradagin.

Á ákærubonkinum sótu ellivu fólk, teirra millum flúgvileiðarar og fólk, sum arbeiddu í leiðsluni í floghavnini. Hinumegin sótu meiri enn hundrað verjar. Ákæruvaldið væntar, at málið fer at enda við umleið 300 krøvum um endurgjald og annað.

Italsku myndugleikarnir hava kannað vanlukkuna í fleiri mánaðir, og nógv fólk eru avhoyrd. Sambært týsku tíðindastovuni DPA er tað leiðslan í floghavnini, sum fær høvuðsábyrgdina av vanlukkuni, tí leiðslan hevði ikki gjørt tær ábøtur, sum hon hevði fingið boð um at gera. Eitt nú vísti tað seg, at radaraskipanin í floghavnini virkaði ikki, sum hon átti, og at lendingarbreytirnar vóru alt ov illa merktar.

## Fartelefon vandamikil

Oljufelagið Shell sigur nú, at tað kann vera vandamikið at tosa í fartelefon, tá ein stendur við eina bensinstøð og koyrir bensin í tangan. Shell sigur, at fartelefonin kann elva til eld, og felagið ætlar sær tí at banna sínum viðskiftafólkum at tosa í fartelefon, tá tey eru á einari bensinstøð.

Shell í Danmark hevur longu boðað frá, at frá 1. desember verður tað bannað viðskiftafólkunum at tosa í fartelefon, meðan tey eru á bensinstøðunum hjá felagnum og dótturfelagnum Metax. Shell í Danmark sigur, at tey hava gjørt nakrar royndir, sum vísa, at neistar frá fartelefonum kunnu elva til eld og spreingingar.

Í Bretlandi hava minst tríggir tilburðir verið, har fartelefonir hava elvt til eld á bensinstøðum, og bretsku myndugleikarnir hava ávarað fólk ímóti at nýta fartelefonina, tá tey fara á eina bensinstøð.

## Sjokoláta fyribyrgir hjartasjúkum

Amerikansk vísindafólk siga seg vera komin eftir, at sjokoláta og kakao kunnu fyribyrgja hjartasjúkum.

Vísindafólkini hava kannað tey bæði sjokolátusløgini Dove og M&M, og har hava tey funnið evnið flavanol, sum hevur góða ávirkan á hjartað. Flavanol er í plantum og matvørum, sum eru gjørdar úr plantum og vinst m. a. í grønmeti, frukt, reyðvíni og kakao. Vísindafólkini siga, at evnið hevur góða ávirkan á blóðrenslið.

Marguerite Engler, professari, sum hevur staðið á odda fyri kanningunum, ávarar kortini fólk ímóti at eta ov nógva sjokolátu. Hon minnir á, at fólk eiga framvegis at hava í huga, at nógvar kaloriur eru í sjokolátu.

## Funnið hol í rúmdini

Granskarar hjá evropeiska rúmdarstovninum ESA hava funnið eitt stórt hol, sum fer ígjøgnum rúmdina sum ein kanónkúla. Ferðin er heilar 400.000 kiloemtrar um tíman.

At kalla samstundis hava amerikanskir rúmdargranskarar funnið tvey ovurstór og higartil ókend hol í rúmdini. Hesi bæði holini mala um hvørt annað.

Evropeisku granskararnir siga, at holið, sum teir hava funnið, hevur kós ímóti Jørðini, men vandi er kortini eingin, tí væntandi fer holið fram við Jørðini um 200 milliónir ár, og teinurin millum Jørðina og holið verður millum 6.000 og 9.000 ljósár, siga teir. Eitt ljósár er tann teinurin, sum ljósið ferðast í eitt ár, og tað svarar til umleið 10.000 milliardir kilometrar.

Tey bæði holini, sum amerikansku granskararnir hava funnið, eru eftir øllum at døma miðdepilin í einum stjørnuhópi. Teinurin millum tey bæði holini er mettur at vera 3.000 ljósár, og holini eru umleið 400 miliiónir ljós ár frá Jørðini.